# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 18-11-2021

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um inntøkutrygd**
(Treytir fyri at vera umfataður av skipanini við minstuløn)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 164 frá 17. desember 2017 um inntøkutrygd, sum broytt við kunngerð nr. 3 frá 12. januar 2021, verður í § 1 aftan á stk. 4 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 5.* Fiskifar er fevnt av skipanini við minstuløn, um miðal dagshýran seinastu tólv mánaðirnar er áljóðandi í minsta lagi kr. 550. Tó skal miðal dagshýran eisini vera áljóðandi í minsta lagi kr. 550 seinastu tríggjar mánaðirnar.
*Stk. 6.* Er talan um nýtt fiskifar ella nýggjan eigara av fiskifari, ið ikki lýkur treytirnar í stk. 4, kann fiskifarið eftir tríggjar mánaðir verða fevnt av skipanini um minstuløn, um miðal dagshýran seinastu tríggjar mánaðirnar er áljóðandi í minsta lagi kr. 550. Henda regla er galdandi fyri einstaka fiskifarið í tólv mánaðir frá fyrstu mynstring."
Stk. 5-9 verða eftir hetta stk. 7-11.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2022.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert